# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Kunnu albanararnir í Kosovo gera tað, so tilskila vit okkum rætt til lat taka sama stigið her*
*(serbarnir í Bosnia)*

# Nú vilja fleiri hava sjálvstýri




*Fagnaðarmyndirnar úr Kosovo hava vakt ans ymsastaðni og kunnu fáa avleiðingar í fleiri londum*
*(Mynd: Reuters)*

**Loysingin hjá Kosovo frá Serbia fær nú minnilutar í øðrum londum at krevja loysing og sjálvstýri**

- Tað albanararnir í Kosovo kunnu fáa sjálvstýri, sum mugu vit hava sama rætt.

Hesin tankin breiðir seg sum eldur út um Evropa í hesum døgum, og tað fyrsta tekinið kom úr grannalagnum hjá Kosovo í gjár, tá tað lokala tingið hjá serbiska minnilutanum í Bosnia kunngjørdi, at tað umhugsar at loysa landslutin Republika Srpska frá hinum partinum av Bosnia.

- Um ein munandi partur av limalondunum í ST og serstakliga ES-londini viðurkenna Kosovo sum sjálvstøðugt land, er tjóðartingið í Republika Srpska av teirri áskoðan, at tað kann tilskila sær rætt til at skriva út fólkaatkvøðu um at endurskoða sína støðu, stendur í samtyktini hjá tinginum.

Síðani kríggið frá 1992 til 1995 hevur Bosnia verið í tveimum pørtum, sum hava hvør sína stjórn, ting og løgreglu. Annar er tann serbiski parturin Republika Srpska, og hin er tað muslimskt-kroatiska samveldið. Nógvir bosniskir serbar halda, at teirra partur eigur at slíta seg leysan av hinum og at fara upp í Serbia ístaðin fyri.

## Eisini aðrastaðni

Í Abkhasia og Suðurossetia, sum eru partar av Georgia, hava tíðindini úr Kosovo eisini vakt ans, og ein talsmaður fyri loysingarrørsluna sigur við eitt georgiskt blað, at teir báðir landspartarnir hava longu umrøtt møguleikan.

Russland sýtir fyri at viðurkenna Kosovo sum sjálvstøðugt land, og tað kann hava sína orsøk, tí sambært embætismonnum í Moskva stúrir russiska stjórnin fyri, at ein viðurkenning haðani fer at eggja minnilutum í eitt nú Hvítarusslandi og Kirgisistan til at gera sum albanararnir í Kosovo.

Abkhasia og Suðurossetia kvettu við Goergia í nítiárunum, og sjálvt um landspartarnir í veruleikanum ráða sær sjálvum, hevur einki land viðurkent teir sum sjálvstøðug lond. Heldur ikki Russland. Men nú óttast georgiska stjórnin, at Russland kann finna upp á at viðurkenna Abkhasia og Suðurossetia sum eitt slag av hevnd fyri, at Vesturheimurin viðurkennir Kosovo.

# Japanar í øðini um neyðtøkur

**Nógvir japanar vilja hava amerikonsku hermenninar av landinum, eftir at tveir amerikanskir hermenn hava neyðtikið tvær kvinnur á oynni Okinawa**




*Tað er eingin ivi um, hvat hesin mótmælismaðurin í Tokyo heldur um teir amerikonsku hermenninar í landinum*
*(Mynd: Reuters)*

Tólv dagar eftir at ein amerikanskur hermaður bleiv skuldsettur fyri at hava neyðtikið eina 14 ára gamla japanska gentu á oynni Okinawa, er ein annar amerikanskur hermaður skuldsettur fyri at hava neyðtikið eina 21 ára gamla kvinnu á somu oyggj. Kvinnan, sum er ættað av Filipsoyggjunum, varð neyðtikin á einum hotelli mánadagin, skrivar japanska tíðindastovan Kyodo.

USA hevur 40.000 hermenn í Japan, og helmingurin av teimum hava støð á oynni Okinawa. Amerikanararnir hava yvirhøvur verið væl lýddir á oynni, men tær báðar neyðtøkurnar hava fingið øði í fólk, og altsamt fleiri vilja hava teir amerikonsku hermenninar burtur haðani.

Tíðindini um tær báðar neyðtøkurnar hava eisini fingið øði í fólk aðrastaðni í Japan, og í høvuðsstaðnum Tokyo hava fólk gingið kravgongu við kravi um, at teir fremmandu hermenninir skulu koyrast av landinum.

Málið hevur eisini fingið nógva politiska umrøðu, og Yasuo Fukuda, forsætisráðharri, hevur sagt, at hann fer at taka málið fram, tá Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, kemur til Japan í næstum.

## STUTT SAGT

### Myrdi tey sjúku

Ein dómstólur í Kekkia hevur dømt ein sjúkrarøktarfrøðing lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava beint fyri sjey sjúklingum og fyri at hava roynt at beina fyri tíggju øðrum sjúklingum. Sambært dóminum gav Peter Zelenka sjúklingunum blóðtynningarevnið Heparin, men í so stórum nøgdum, at sjúklingarnir fóru at bløða. Tað kom eisini fram, at hann hevði givið sjúklingunum evnið uttan at tosa við nakran lækna fyrst. Í rættinum viðgekk Peter Zelenka, at hann hevði givið sjúklingunum Heparin, men hann dugdi ikki at siga, hví hann hevði givið teimum ov nógv, og hann bað um umbering fyri gerðir sínar. Hann bað um at sleppa undan lívlongum fongsli, tí heilsan er farin at bila, men tað hjálpti ikki.

### Dómari bað um virðing

Scott Baker, sum er dómari í teirri serligu hoyringini um Dianu prinsessu, ávaraði í gjár fjølmiðlarnar og onnur ímóti at niðurgera rættin og tað arbeiðið, sum har verður gjørt. Hann segði, at rætturin skal taka støðu til vitnisfrágreiðingar og einki annað, og at tað tí er skeivt, tá summi knýta ymisk onnur viðurskifti upp í málið. Scott Baker heitti samstundis á fjølmiðlarnar og onnur um ikki at siga ella at skriva nakað, sum kann fáa ávirkan á tann endaliga úrskurðin. Tað týdningarmesta er, at tey, sum bera tíðindi, hava virðing fyri tí, sum sagt verður, segði dómarin.

### Myrdi fimm kvinnur

Rætturin í enska býnum Ipswich hevur dømt ein 49 ára gamlan mann sekan í at hava tikið lívið av fimm skøkjum í býnum. Sambært rættinum drap Steve Wright tær fimm kvinnurnar í november og desembur í 2006. Løgreglan fann líkini uttan fyri býin. Steve Wright viðgekk í rættinum, at hann hevði kent kvinnurnar, men hann noktaði at hava beint fyri teimum. Hann kann vænta sær lívlanga fongsulsrevsing.